


# Leiðarabyrjan 2018

31/08 - 01/09

Hvat er ein góður leiðari og hvat skal hann so duga. Tann spurningin fara vit at svara á Leiðarabyrjanini 2018.
Tað er sera umráðandi, at vit hjá skótunum virða at hava góðar leiðarar. Og tað fáa vit bert við at útbúgva okkum innan hetta økið. Fyrsta stigið hjá tær var at gerast leiðari hjá okkum, og næsta stigið er so at koma við til leiðarabyrjan. Vit ynskja tó, at vit í ár, eisini síggja tey sum hava verið leiðarar í longri tíð. Bæði tí at tey hava nógv at læra frá sær og tí vit vóna at tey fara ríkari heim aftur leygardagin.

## Hvat skal ein skóti duga?

**TODO listi**

1. Læra 100 knútar
2. Minnast allar 32 ættirnar
3. Duga morsialfabeti uttanat
4. Kenna 30 kotur

Skal ein duga øll hesi tingini fyri at kalla seg ein rættan skóta. Tí so er leiðarin noyddur at hava minst somu evnir.

Lat okkum heldur hyggja eftir HVÍ vit skulu læra knútar, morsing o.s.fr. Man har ikki vera ein orsøk til hetta og hvat er hon so.

## Góð planlegging gevur arbeiðsfrið!

Vit fara at leggja dent á at tit koma at læra tað sum skal til fyri at leggja eina skrá. Bæði til sjálvan fundin og fyri skótaárið. Vit fara at arbeiði við hvat innihald ein góð skrá skal umfata. Fyri at fanga áhugan hjá øllum skótunum.

**Hvar og nær verur skeiði?**
Vit hittast í Skótahúsinum í Leirvík fríggjadagin 31 august og skeiðið byrjar kl.19.00. Vit enda Leygarkvøldi 1 Septembur kl. 20.00.

**Tilmelding og kostnaður.**
Tit melda til við at senda ein teldupost til info@skoti.fo. Har tit upplýsa navn, føðingardag, skótabólk og teldupost. Kostnaður fyri skeiðið er 150 kr og skjal flytast á konto 9181 – 4075295 viðmerk navn. Luttakararnir skipa sjálvir fyri ferðing til skeiðið.

**Um spurningar eru:** kunnu tit venda tykkum til Jónu Venned – 218332
Ella senda teldupost til info@skoti.fo

Við skótakvøðu *Leguleiðslan*